# Vinnukærunevndin - avgerðir

| **Mál nr. :**<br>**23/05122** | **Lóg:**<br>**Lóg um innflyting og hald av vandamiklum djórum o.ø**<br>**og**<br>**Kunngerð um at innflyta hundar v.m.** | **Avgerð tikin:**<br>**17. mars 2023** |
|---|---|---|

**Sýtt innflutning av hundi av slagnum Olde English Bulldogge**


**Samandráttur:**

**Kært verður um, at Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur sýtt umsókn um innflutning av einum Olde English Bulldogge.**

**Kærarin førir fram, at tað ongastaðni framgongur á heimasíðuni hjá HSF, at tað ikki er loyvi at innflyta hetta hundaslagið, og at tað eru fleiri aðrir hundar av hesum slagnum í Føroyum.**

**Nýggja kunngerðin frá 1. oktober 2021 hevur forboð móti innflutningi av hundum, sum upprunaliga eru aldir til bardaga, varðhald, jakt ella verju, hava ágangandi tvísint sinnalag og eru sterk og harðfør, umframt blandingar av hundasløgum við hesum eginleikum. Landsdjóralæknn ger av, hvørji hundasløg eru fevnd.**

**Kæran er tann fyrsta síðani nýggja kunngerðin kom í gildi.**

**Føroya Kærustovnur avgerð at staðfesta avgerðina hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, um at sýta innflutningi av hundinum hjá kæraranum. Føroya Kærustovnur metir, at Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur gjørt eina ítøkiliga meting av hundaslagnum, og at tað ikki er grundarlag fyri at seta hesa metingina til síðis.**


**Kærda avgerðin hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni**

Í avgerð, dagfest 17. februar 2023, skrivar Heilsufrøðiliga starvsstovan soleiðis:

> “Vedrørende din ansøgning om importtilladelse til hund: Der gives ikke tilladelse til at importere hunde af typen Olde English Bulldog til Færøerne.
>
> Ifølge § 4 og 5 i bekendtgørelse nr. 82 fra 18 maj 2021 om at importere hunde, katte og avlsmateriale, er det forbudt at importere hunderacer, som kan være farlige for mennesker eller dyr. Alle hunderacer, som der bliver søgt om importilladelse til, bliver vurderet ud fra bestemmelserne i nævnte bekendtgørelse. Det er desuden ikke tilladt at importere blandingshunde hvori der indgår hunderacer, som ud fra bekendtgørelsens bestemmelser ikke får importtilladelse.“

# Vinnukærunevndin - avgerðir

**Kæruummæli frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni**

Í kæruummæli dagfest hin 27. februar 2023 skrivar Heilsufrøðiliga starvsstovan soleiðis:

> "Við heimild í § 4 og § 5 í kunngerð nr. 82 frá 18. mai 2021 um at innflyta hundar, kettur og gitnaðarevni, var avgerð tikin, 17. februar 2023, um ikki at loyva innflutningi av Olde English Bulldogge.
>
> Høvuðspástandir kærarans eru skrivaðir við skákskrift niðanfyri. Ummælið er gjørt til hvønn pástand beint eftirfylgjandi.
>
> ***Fandt intet der tydede til at Old English Bulldog skulle være et problem***
> Sambært § 1 í løgtingslóg nr. 58 frá 22. apríl 2003 um innflyting og hald av vandamiklum djórum, kann landsstýrismaðurin áseta reglur um forboð fyri innflutningi av vandamiklum og eksotiskum djórum til Føroya og hald av slíkum djórum í Føroyum. Eftir stk. 2 eru djór vandamikil, sum við biti, eiturstingi ella á annan hátt kunnu verða til vanda fyri menniskju ella djór.
>
> Lóggevarans vilji er at forða fyri, at vandamikil djór verða innflutt til ella hildin í Føroyum, sí almennu viðmerkingar og serligu viðmerkingar til § 1 í ll. um innflutning og hald av vandamiklum djórum o.ø.
>
> Reglurnar um innflutning og ferðing við hundum og kettum broyttist við kunngerð nr. 82 frá 18. mai 2021 um at innflyta hundar, kettur og gitnaðarevni. Eitt av endamálinum við broytingini var m.a. at gera greiðari áseting um, hvat eitt vandamikið hundaslag er. Tá bleiv eisini gingið burtur frá heitinum kamphundur sbrt. § 3, stk. 2 í gomlu kunngerðini. Í staðin bleiv nágreinað hvat vandamikið hundaslag er, sum ikki kann fáa innflutningsloyvi til Føroya, nevnliga:
>
> § 4, stk. 2 sum ásetir at: *Forboðið í stk. 1 fevnir um hundasløg, sum upprunaliga eru ald til bardaga, varðhald, jakt ella verju, hava eitt ágangandi ella tvísint sinnalag og eru sterk ella harðfør. Forboðið í stk. 1 fevnir eisini um hundasløg, sum kunnu hava aðrar óynsktar eginleikar.*
>
> Umframt at § 4, stk. 4 ásetir at:
> *Uttan mun til lutfall er bannað at innflyta blandingar av hundasløgum, sum hava eginleikarnar, nevndir í stk. 2.*
>
> Ein listi er gjørdur fyri hundasløg, sum higartil eru mett ikki at kunna fáa innflutningsloyvi til Føroya.
>
> Landsdjóralæknin, sum tann ovasti djóralæknafrøðiligi (veterineri) myndugleikin í Føroyum, ger eftir einari ítøkiligari, objektivari vandameting av hvørjum einstøkum hundaslagi sær, hvørji hundasløg skulu verða á listanum fyri ikki loyvd hundasløg sbrt. § 4, stk. 2 ella § 4, stk. 4.
> Hetta er ásett í § 4, stk. 6 í nýggju kunngerðini sum, at tað er "landsdjóralæknin sum ger

av, hvørji hundasløg eru fevnd av stk. 1.”

Tað verður framhaldandi arbeitt við at dagføra listan fyri hundasløg, umframt at viðgera øll hundasløgini av nýggjum, bæði tey hundasløgini sum kunnu koma til Føroya og tey hundasløg, ið ikki eru loyvd at innflyta til Føroya. Hetta verður í høvuðsheitum gjørt so hvørt umsóknir koma inn til Heilsufrøðiligu starvsstovuna.

Listin sæst á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Á listanum sæst, at seinast listin varð dagførdur, vóru tvey hundasløg viðgjørd eftir nýggju kunngerðini, sum mett vera fevnd av § 4, stk. 2.

Á síðu 2 á listanum síggjast eisini treytirnar, sum øll hundasløg verða viðgjørd eftir, so hvørt sum umsóknir um nýggj/óviðgjørd hundasløg koma inn. Um eitt hundaslag, í hesari arbeiðstilgongdini, verður mett at vera fevnt av § 4, stk. 2 ella § 4, stk. 4 verður listin dagførdur samsvarandi. Soleiðis koma hundasløg á og kunnu fara av aftur listanum, um tað verður mett ráðiligt. Viðmerkjast skal, at fleiri hundasløg eru viðgjørd av Landsdjóralæknanum, sum eru mett at kunna fáa innflutningsloyvi til Føroya, og tí ikki skulu á listan.

**Viðurkend hundasløg**

Øll kunnu sum so stovna eitt hundafelag og viðurkenna eitt hundaslag, uttan at hava sama standard fyri hundasløgini, sum stór og viðurkend hundafeløg. Tað kann vera ein orsøk til, at eitt hundaslag er viðurkent t.d. í USA, men ikki í Evropa ella øvugt. Innanfyri sama land kunnu hundasløg vera viðurkend av einum hundafelagi og ikki í einum øðrum.

Sum viðurkend hundasløg stuðlar Føroyar seg upp at hundasløgum, sum eru viðurkend av kennelfeløgum í okkara grannalondum, serliga hjá altjóða felagsskapinum FCI. Um ivamál er um, hvørt eitt hundaslag er viðurkent ella ikki, er tað viðurkenningin hjá FCI, sum vigar tyngst.

Standardir fyri hundasløgini (rasustandardir) eru settir fyri at tryggja, at hundar av sama hundaslagi líkist so nógv, bæði tá ræður um sinn og skinn, soleiðis at eingin ivi er um, at hetta er eitt hundaslag. Arbeiðið við at ala eitt hundaslag fram má tí vera miðvíst og yvir longri tíð.

FCI sigur í síni FCI standing Orders, Enclosure 5, at: “A new breed can be recognized as such when it meets the definition of a breed: “A population of dogs sharing definable and inheritable phenotypic characteristics, after breeding undertaken by humans over a given period of time, allowing this population to be distinguished from other defined populations of dogs/or defined breeds.” (Modified after Clutton-Brock (1999))”, *sí www.fci.be, undir skiljiblaðnum Regulation.*

Tá FCI verður spurt um Olde English Bulldogge er eitt viðurkent hundaslag, verður hetta svarað tann 27.01.23: *HFS-málnr. 21/01531-72*

*“The Old English Bulldog and the Leavitt Bulldog are not recognized by the FCI.*

# Vinnukærunevndin - avgerðir

*A procedure which includes various specific conditions has to be submitted to the FCI in order for a breed to be recognised at an international level.*

*For your information, you can find the FCI procedure for the international recognition of a breed on the FCI website under the section "Regulations-Standing Orders ": [http://www. fci. be/en/](http://www.fci.be/en/)*
*We would like to point out the fact that the application for the international recognition of a new breed must be directed to the FCI Secretariat by the national canine organization (affiliated to the FCI) of the country of origin of the breed.*

*Please note that new breeds can be either a population of dogs, which is regionally or nationally recognized or a new population of a unique type of dog.* ***They cannot be the result of a direct cross between two FCI recognized breeds,*** *which seems to be the case here for the Old English Bulldog and the Leavitt Bulldog (cross between the Bulldog and the Bullmastiff)."*

**Hundalistin, fyri ikki loyvd hundasløg**
Listin er gjørdur, við at gera eina gjølla meting av einstaka hundaslagnum út frá fakligari vitan á økinum, undir hesum faklitteraturi. Í sambandi við viðgerð av listanum verður eisini hugt at samsvarandi lóggávuøkið í okkara grannalondum. Her skal nevnast, at bæði Danmark, Svøriki og Finnland eru rættiliga liberal á hesum økinum.

Í metingini verður dentur lagdur á eina heildarmeting fyri einstaka hundaslagið. Harumframt verður ein meting gjørd um serføroysk viðurskifti, t.d. at seyður og gæs, men eisini børn ganga meiri frítt úti enn í øðrum londum, har ikki loyvdu hundasløgini ofta hava størri útbreiðslu. Harumframt eiga vit í Føroyum, út frá eini varsemisreglu, at tryggja at ein og hvør, skal kunna kenna seg tryggan og vandaleysan í almenna rúminum. Føroyski listin hevur sostatt einki við útlendskar reglur at gera.

Ein eginleiki sum hundasløgini ofta hava, sum ikki fáa innflutningsloyvi til Føroya, er, at tey eru ómetaliga sterk, og kunnu hava eitt tvísint lindi, skilt soleiðis, at hundasløgini eru øgiliga loyal mótvegis eigaranum, men kunnu knappliga skifta atburð mótvegis serliga djórum men eisini fólki. Tí skulu slík hundasløg sosialiserast tíðliga og hava eina sera miðvísa venjing, krøv, ið ikki verða sett hundaeigarum í Føroyum. Og sum Heilsufrøðiliga starvsstovan ikki hevur heimild at hava eftirlit við.

Tað er umráðandi at hava í huga, at hundasløgini, ið eru nevnd á listanum ikki eru mett út frá einstøkum hundum av einum slagi, men út frá eini lýsing av hundaslagnum sum heild, t.e. rasa.

***har talt med flere der har fået dem til landet også***
Heilsufrøðiliga starvsstovan heldur seg til ítøkiliga málið og galdandi lóggávu. Um Olde English Bulldogge er komin til Føroya eftir at nýggja kunngerðin er komin í gildi, eru hesir antin komnir ólógliga til landi ella tí at eigarin hevur givið Heilsufrøðiligu starvsstovuni skeivar upplýsingar.

# Vinnukærunevndin - avgerðir

***Det er før er stadfæstet at netop Old english bulldog er avlet (...) mod at være en passiv og familie kær hund***

Vart skal gerast við at Heilsufrøðiliga starvsstovan ongantíð hevur viðurkent Olde English Bulldogge sum eitt hundaslag, ið er loyvt at innflyta til Føroya.

Sum omanfyrinevnt er kunngerðin um at innflyta hundar, kettur og kelidýr broytt. Áðrenn hesa broyting varð heiti kamphundur nýtt fyri hundaslag, sum ikki var loyvt at flyta inn til Føroya.

Vinnukærunevndin kom til ta niðurstøðu í kærumálinum frá 2012, at Olde English Bulldogge í enduralingini frá 1970 ikki er aldur og vandur til aggressiva atferð, *HFSmálnr 12/00975-7*.
Vinnukærunevndin metti, at tað var ivasamt at avgerandi dentur kundi vera lagdur á, um hundurin var partvíst blandingur av kamphundum. Dentur átti eisini at verða lagdur á, um hundurin var aldur og vandur til aggressiva atferð. Henda metingin sást ikki at vera gjørd í táverandi meting hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Í viðgerðini av hundasløgum eftir nýggju kunngerðini eru nú fleiri treytir sum skulu verða loknar, áðrenn avgerast kann um eitt hundaslag skal fáa loyvi til at at verða innflutt til Føroya ella ikki.

Dentur verður ikki longur einans lagdur á, um eitt hundaslag er kamphundaslag ella ikki. Hinvegin verður mett um hvørjar eginleikar hundaslagið hevur sambært § 4, stk. 2.

**Viðgerð av Olde English Bulldogge eftir nýggju kunngerðini**
Olde English Bulldogge bleiv viðgjørt av nýggjum eftir nýggju kunngerðini í sambandi við umsókn um innflutning av hundi til Føroya, *HFS- málnr. 23/00274-1.*

Frá keldum og lærubókum, sí keldulista, verður sagt um Olde English Bulldogge samanhildið við § 4, stk. 2 í kunngerðini:

**Upprunaliga eru ald til bardaga, varðhald, jakt ella verju**
Olde English Bulldogge er ikki viðurkent av FCI enn (januar 2023). Sambært FCI er Olde English Bulldogge ein blandingur av English Bulldog og Bullmastiff, *HFS-málnr. 21/01531-70.* Aðrar keldur vilja vera við, at Olde English Bulldogge er blandingur av fleiri hundasløgum, sí kærumálið frá 2012. Fleiri av hesum íblandaðu hundasløgum eru upprunaliga ald til bardaga, varðhald, jakt ella verju.

**hava eitt ágangandi ella tvísint sinnalag**
Um Old English Bulldogge

- (...) der er store variationer inden for racen (Dansk kennel klub).
- ... en glad og venlig familiehund...velegnet til børnefamilier (Dansk kennel klub)

- Racen er selvstændig, og dette bør man have i baghovedet, når man har med en old english bulldog at gøre. (Dansk kennel klub)
- Hundaslagið hevur eitt víttfevnandi (undirliggjandi) ágangandi sinnalag, og eigur at verða viðfarin ekstremt varðliga. (Fogle, dr. Bruce)

Tað er trupult at siga, um eitt hundaslag hevur eitt ágangandi ella tvísint sinnalag, tá talan ikki er um eitt viðurkent hundaslag. Um hundasløgini, ið eru brúkt til at ala Olde English Bulldogge verður tó sagt:

- Bullmastiff: Ovverjir sína familju, *HFS – málnr. 21/01531-70.*
- Amerikanskur Pitbullterrier: Er sera aggresivur yvirfyri øðrum hundum. (tó ikki yvirfyri fólki) *HFS- málnr. 21/01531-63*
- Amerikanskur Bulldog: Hevur eina sterka verjuílegu (da: beskytterinstinkt). Um hundaslagið følir seg kroystan serliga yvirfyri fremmandum hevur hann lyndi til at verða útfarandi, *HFS- málnr. 21/01531-68*

Omanfyrinevndu hundasløg eru hundasløg sum eru mett ikki at verða loyvd at innflyta til Føroya sbrt. § 4, stk. 2. Heilsufrøðiliga starsvsstovan metir, at sannlíkindini fyri at Olde English Bulldogge hevur onkrar av hesum óynsktu eginleikunum er ov stórur.

**og eru sterk ella harðfør**
Fleiri keldur, m.a. Dansk kennel klub frá hunderacer.dk og The complete dog breed book, lýsa Olde English Bulldogge sum sera sterkan.

**Forboðið í stk. 1 fevnir eisini um hundasløg, sum kunnu hava aðrar óynsktar eginleikar**
Kunnu hava heilsutrupulleikar. Hesin trupulleikin er ikki tikin við í viðgerðini av Olde English Bulldogge.

§ 4, stk. 4. Uttan mun til lutfall er bannað at innflyta blandingar av hundasløgum, sum hava eginleikarnar, nevndir í stk. 2.
Av tí at Olde English Bulldogge ikki er at meta sum eitt viðurkent hundaslag, men hinvegin er ein blandingur av hundasløgum, sum eru fevnd av § 4, stk. 2, lýkur Olde English Bulldogge treytirnar í § 4, stk. 4 um ikki at innflyta blandingar av hundasløgum til Føroya uttan mun til lutfall.

Í viðgerðini av Olde English Bulldogge hevur Heilsufrøðiliga starvsstovan, í punktum, lagt dent á m.a. á hesi viðurskifti, *HFS - málnr.21/01531 - 72* samanhildið við treytunum í § 4, stk. 2.

**Viðurskifti, ið tala fyri at loyva innflutningi**

- An extremely strong but **friendly and loving companion dog** (The complete dog breed book)
- They are, first and foremost, excellent companions, while also possessing the drive, temperament and agility to perform in numerous working venues as well as being

service dogs. (United Kennelclub)

- En old english bulldog er en glad og venlig familiehund. (Dansk Kennelklub frá hunderacer.info)
- **Racen er velegnet til børnefamilier,** dog bør mindre børn ikke lufte hunden alene, da old english bulldogs er fysisk og psykisk stærke og vil kræve flere kræfter at holde end det, et mindre barn kan præstere. (Dansk Kennel klub frá Hunderacer.info)

**Viðurskifti, ið tala ímóti at loyva innflutningi**

- Hundaslagið hevur eitt víttfevnandi (undirliggjandi) ágangandi sinnalag, og eigur at verða viðfarin ekstremt varliga. (Fogle, dr. Bmce)
- **An extremely strong** but friendly and loving companion dog (Dogbreeds)
- cross between the Bulldog and the Bullmastiff (t-postur frá FCI)
- ...er også en vagthund, der forstår at passe på hus og hjem. (Dansk Kennel klub frá Hunderacer.info)
- Racen er velegnet til børnefamilier, dog bør mindre børn ikke lufte hunden alene, da old english bulldogs **er fysisk og psykisk stærke og vil kræve flere kræfter at holde end det, et mindre barn kan præstere.** (DKK frá Hunderacer.info)
- ...der er store variationer inden for racen. (Dansk Kennel klub frá Hunderacer.info)
- Racen er selvstændig, og dette bør man have i baghovedet, når man har med en old english bulldog at gøre. (Dansk Kennelklub frá Hunderacer.info)
- Med så store hunde er det altid vigtigt at hunden socialiseres i en tidlig alder for at undgå aggressiv adfærd. (Dansk Kennelklub frá Hunderacer.info)

**Niðurstøða**

Heilsufrøðiliga starvsstovan stuðlar seg upp at serliga FCI, tá metast skal um eitt hundaslag er viðurkent ella ikki.

FCI hevur ikki viðurkent Olde English Bulldogge sum eitt hundaslag. Ymiskir aðrir kennelklubbar hava heldur ikki viðurkent Olde English Bulldogge sum eitt hundslag, t.d. Svenska kennelklubben, *HFS -málnr.21/01531-72,* American kennelclub og The kennelclub (UK). Dansk kennelklub hevur viðurkent Olde English Bulldog og sett hann á ein sokallaðan x - lista, ið merkir at "vejen til definitiv FCI godkendelse går over de nationale kennelklubber (som fx DKK), der typisk har et x- register, hvor hundene registreres, indtil de godkendes i hele FCI." *HFS- málsnr. 23/00285-7.*

Tá FCI metir um eitt hundaslag kann viðurkennast skal hundaslagið kunna standardiserast, *"A procedure which includes various specific conditions has to be submitted to the FCI in order for a breed to be recognised at an international level"* Í rasustandardinum stendur m.a. eisini hvussu "behaviour and temperement" skal vera.

Hóast hundar av einum ávísum hundaslagi ongantíð kunnu verða líka í sinni, metir Heilsufrøðiliga starvsstovan tað vera í andsøgn við at ein viðurkend rasa skal verða

standardisera, tá Dansk kennel klub sigur m.a. um Olde English Bulldogge at "der er store variationer inden for racen". Hetta týðir uppá at "hundaslagið" ikki er vorðið eitt støðugt hundaslag enn, sum lýkur ávísar standardir, sum er treytin fyri at eitt hundaslag verður viðurkent. Sambært FCI kann eitt hundaslag ikki verða ein beinleiðis blandingur millum tvey ymisk hundasløg sum FCI longu hevur viðurkent.

Av tí at FCI ikki viðurkennur Olde English Bulldogge sum eitt hundaslag og av tí at fleiri aðrir kennelklubbar ikki eru á einum máli um, hvørt talan er um eitt hundaslag ella ikki, metir Heilsufrøðiliga starvsstovan ikki at Olde English Bulldogge er eitt hundaslag. Hinvegin er Olde English Bulldog at meta sum ein blandingur av fleiri hundasløgum, ið frammanundan eru mett at kunna vera vandamikil fyri fólk ella djór.

Heilsufrøðiliga starvsstovan umsitur kunngerð nr. 82 frá 18. mai 2021 um at innflyta hundar, kettur og gitnaðarevni. Heimildargrundarlagið er millum annað ll. nr. 58 frá 22. apríl 2003 um innflutning og hald av vandamiklum djórum o.ø. Lóggevars vilji er at vandamikil djór ikki skulu hava frítt at fara til Føroya. Heimildina til at fyribyrgja hesum hundasløgunum í at koma til Føroya hevur landsdjóralæknin, sum ovasti djóralæknafakligi mynduleiki í Føroyum, við at gera av hvørji hundasløg skulu verða sett á listan fyri forboðin hundasløg sbrt. § 4, stk. 1, sbr. § 4, stk. 6.

Um so er, at Olde English Bulldogge verður viðurkent av FCI, kann málið verða tikið upp til nýggja viðgerð."

**Kæran**

Í telduposti, dagfestur 20. februar 2023, skrivar kærarin soleiðis:

"Jeg er i den uheldige situation vi ( børn og forældre) står og skal hente vores ny hundehvalp da vores tidligere desværre er afdød.

I denne forbindelse undersøgte jeg grundigt hvilke hunde ikke måtte indføres og fandt intet der tydede til at Old English Bulldog skulle være et problem (har talt med flere der har fået dem til landet også )

Min ansøgning hos HFS bliver afvist på det grundlag, at de mener hunden er "farlig" på trods af at det før er stadfæstet at netop Old english bulldog er avlet fra 1800 tallet og frem mod at være en passiv og familie kær hund.

Vi står i den uheldige situation at fly billeter, transportbure, og dyrelæge alt står klar så hunden kan hentes .... 2023.

Hunden vil i givet fald blive aflivet hvis ikke vi finder en løsning i tide.

Jeg har set at dette er blevet kæret før, og at I har dengang stadfæstet at hunderacen gerne måtte indføres.

Jeg håber dette er noget i kan hjælpe med"

Í einum øðrum telduposti til Føroya Kærustovn sama dag, skrivar kærarin soleiðis:

> "Kan til dette tilføje at afgørelse er taget på det grundlag at de betragter Old english bulldog som blandingshund på trods af at den anerkendes som en race i DKK (dansk kennel klub)
>
> Ligeledes er der blevet indført flere uden nogle problemer, og at de begrunder dette på kunngerd nr. 82 fra 18 mai 2021.
>
> Ved telefonisk kontakt med HFS blev jeg fortalt at de grundet fravær endnu ikke har opdateret listen og skrevet Old english bulldog og engelsk bulldog på."

Í einum triðja telduposti til Føroya Kærustovn, dagfest 20. februar 2023, skrivar kærarin soleiðis:

> "Blot som opfølgende information så har vi idag været i forbindelse med nogle andre ejere, samt fået oplyst at der som minimum er mindst 20 andre Old english bulldogs her på Færøerne.
>
> Vi har søgt HFS' hjemmeside op og ned om begrundelse for hvorfor netop Old english bulldog skulle afvises, men må desværre erkende at vi er på bar bund.
>
> I forbindelse med at have talt med ejerne af hundene er vi ikke støt på en der har haft problemer ved indførsel. Jeg har undersøgt racen grundigt og kan ikke finde noget scenarie hvor racen benævnes farlig, som HFS udtrykker og alt hvad der læses via internet mv så er den en familiehund frem for alt og med stort F i familie.
>
> Som der tidligere er blevet stadfæstet i 2012 i jeres afgørelse om en lignende sag, så er "blandings" sammensætning der blev lavet i 1970 erne netop for at skabe en roligere familie egnet hund. Hvilket også er blevet bekræft de seneste 53 år. Hvad der så ligger til grundlag for man fra maj 2021 og frem til nu vælger at betragte den som en blandings race og "farlig" er mig fortsat en gåde"

**Lógargrundarlagið**

Løgtingslóg nr. 58 frá 22. apríl 2003 um innflyting og hald av vandamiklum djórum o.ø, sum seinast broytt við løgtingslóg nr..31 frá 17. mars 2022.

Kunngerð nr. 82 frá 18. mai 2021 um at innflyta hundar, kettur og gitnaðarevni (kunngerð um at innflyta hundar v.m).

**Avgerðin hjá Føroya Kærustovni**

Føroya Kærustovnur viðmerkir, at sambært § 1, stk. 1 í lóg um innflutning og hald av vandamiklum djórum o.ø. kann landsstýrismaðurin áseta reglur um forboð fyri innflutningi av vandamiklum og eksotiskum djórum til Føroya og haldi av slíkum djórum í Føroyum. Sambært

§ 1, stk. 2 eru djór vandamikil, sum við biti, eiturstingi ella á annan hátt kunnu verða til vanda fyri menniskju ella djór.

Sambært almennu viðmerkingunum til lógina, er endamálið við lógini at fáa greitt heimildargrundarlag fyri at nokta innflutningi og hald av m.a. vandamiklum og eksotiskum djórum.

Landsstýrismaðurin hevur í § 4, stk. 1, í kunngerð um at innflyta hundar v.m. ásett, at tað er bannað at innflyta hundasløg, sum kunnu vera vandamikil fyri fólk ella djór.

Sambært § 4, stk. 2 í kunngerð um at innflyta hundar v.m., fevnir forboðið í stk. 1 um hundasløg, sum upprunaliga eru ald til bardaga, varðhald, jakt ella verju, hava ágangandi ella tvísint sinnalag og eru sterk ella harðfør. Forboðið í stk. 1 fevnir eisini um hundasløg, sum kunnu hava aðrar óynsktar eginleikar.

Sambært § 4, stk. 4 í kunngerð um at innflyta hundar v.m. er tað, uttan mun til lutfall, bannað at innflyta blandingar av hundasløgum, sum hava eginleikarnar, nevndir í stk. 2.

Sambært § 4, stk. 6 í kunngerð um at innflyta hundar v.m. er tað Landsdjóralæknin, sum ger av, hvørji hundasløg eru fevnd av stk. 1.

Sambært málsupplýsingunum hevur Heilsufrøðiliga starvsstovan tann 1. februar 2023 viðgjørt hundaslagið Olde English Bulldogge av nýggjum eftir nýggju kunngerðini.

Í viðgerðini av Olde English Bulldogge hevur Heilsufrøðiliga starvsstovan lagt dent á m.a. hesi viðurskiftini samanhilidið við treytunum í § 4, stk. 2:

**“Viðurskifti, ið tala fyri at loyva innflutningi**

- An extremely strong but **friendly and loving companion dog** (The complete dog breed book)
- They are, first and foremost, excellent companions, while also possessing the drive, temperament and agility to perform in numerous working venues as well as being service dogs. (United Kennelclub)
- En old english bulldog er en glad og venlig familiehund. (Dansk Kennelklub frá hunderacer.info)
- **Racen er velegnet til børnefamilier,** dog bør mindre børn ikke lufte hunden alene, da old english bulldogs er fysisk og psykisk stærke og vil kræve flere kræfter at holde end det, et mindre barn kan præstere. (Dansk Kennel klub frá Hunderacer.info)

**Viðurskifti, ið tala ímóti at loyva innflutningi**

- Hundaslagið hevur eitt víttfevnandi (undirliggjandi) ágangandi sinnalag, og eigur at verða viðfarin ekstremt varliga. (Fogle, dr. Bucce)
- **An extremely strong** but friendly and loving companion dog (Dogbreeds)
- cross between the Bulldog and the Bullmastiff (t-postur frá FCI)

- ...er også en vagthund, der forstår at passe på hus og hjem. (Dansk Kennel klub frá Hunderacer.info)
- Racen er velegnet til børnefamilier, dog bør mindre børn ikke lufte hunden alene, da old english bulldogs **er fysisk og psykisk stærke og vil kræve flere kræfter at holde end det, et mindre barn kan præstere.** (DKK frá Hunderacer.info)
- ...der er store variationer inden for racen. (Dansk Kennel klub frá Hunderacer.info)
- Racen er selvstændig, og dette bør man have i baghovedet, når man har med en old english bulldog at gøre. (Dansk Kennelklub frá Hunderacer.info)
- Med så store hunde er det altid vigtigt at hunden socialiseres i en tidlig alder for at undgå aggressiv adfærd. (Dansk Kennelklub frá Hunderacer.info)"

Heilsufrøðiliga starvsstovan greiðir frá, at sum viðurkend hundasløg stuðlar Føroyar seg upp at hundasløgum, sum eru viðurkend av kennelfeløgum í grannalondunum, serliga hjá altjóða felagsskapinum FCI. Um ivamál er um, hvørt eitt hundaslag er viðurkent ella ikki, er tað viðurkenningin hjá FCI, sum vigar tyngst.

Sambært málsupplýsingunum er Olde English Bulldogge ikki viðurkent sum sjálvstøðugt hundaslag hjá FCI, og fleiri kennelklubbar eru ikki á einum máli um, hvørt talan er um eitt hundaslag ella ikki. Dansk kennelklub hevur viðurkent Olde English Bulldogge og sett hann á ein sokallaðan x-lista, ið merkir at "vejen til definitiv FCI godkendelse går over de nationale kennelklubber (som fx DKK), der typisk har et x-register, hvor hundene registreres, indtil de godkendes i hele FCI."

Av tí at FCI ikki viðurkennur Olde English Bulldogge sum eitt hundaslag og av tí at fleiri aðrir kennelklubbar ikki eru á einum máli um, hvørt talan er um eitt hundaslag ella ikki, metir Heilsufrøðiliga starvsstovan ikki at Olde English Bulldogge er eitt hundaslag.

Heilsufrøðiliga starvsstovan metir hinvegin, at Olde English Bulldogge er at meta sum ein blandingur av fleiri hundasløgum, ið frammanundan eru mett at kunna vera vandamikil fyri fólk og djór.

Sambært FCI er Olde English Bulldogge er ein blandingur av English Bulldog og Bullmastiff, og sambært øðrum keldum er Olde English Bulldogge ein blandingur av Bullmastiff, English Bulldog, American Bulldog og American Pitbullterrier.

Heilsufrøðiliga starvsstovan vísir á, at tað er trupult at siga, um eitt hundaslag hevur eitt ágangandi ella tvísint sinnalag, tá talan ikki er um eitt viðurkent hundaslag. Víst verður tó á, at fleiri av omanfyri nevndu hundasløgum, sum Olde English Bulldogge er ein blandingur av, eru upprunaliga ald til bardaga, varðhald, jakt ella verju. Um hesi hundasløgini verður m.a. sagt, at:

- "Bullmastiff: Ovverjir sína familju, *HFS – málnr. 21/01531-70.*
- Amerikanskur Pitbullterrier: Er sera aggresivur yvirfyri øðrum hundum. (tó

ikki yvirfyri fólki) *HFS- málnr. 21/01531-63*

- Amerikanskur Bulldog: Hevur eina sterka verjuílegu (da: beskytterinstinkt). Um hundaslagið følir seg kroystan serliga yvirfyri fremmandum hevur hann lyndi til at verða útfarandi, *HFS- málnr. 21/01531-68"*

Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur mett, at omanfyri standandi hundasløg ikki kunnu verða loyvd at innflyta til Føroyar, sbrt. § 4, stk. 2 í kunngerðini um at innflyta hundar v.m. Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur eisini mett, at sannlíkindini fyri, at Olde English Bulldogge hevur onkrar av hesum óynsktu eginleikinum er ov stórur.

Vísandi til omanfyri standandi metir Føroya Kærustovnur, at Heilsufrøðiliga starvsstovan við støði í § 4 í kunngerðini hevur gjørt eina ítøkiliga meting av hundaslagnum Olde English Bulldogge, og at tað ikki er grundarlag fyri at seta hesa metingina til síðis. Mett verður, at Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur heimild at nokta innflutningi av Olde English Bulldogge, tí hann er ein blandingur av hundasløgum, sum, sambært málsupplýsinginum, hava eginleikar, sum eru nevndir í § 4, stk. 2 í kunngerðini.

Kærarin hevur víst á, at Vinnukærunevndin í 2012 hevur staðfest, at Olde English Bulldogge ikki er ein kamphundur sambært § 2, stk. 1, nr. 4 í áður galdandi kunngerð nr. 15 frá 7. apríl 2004 um innflutning av hundum v.m., hóast hann hevur íblanding av bullmastiff, amerikansk pitbullterrier og amerikansk bulldog. Hetta tí, at Vinnukærunevndin metti, at hundurin í enduralingini ikki var aldur og vandur til aggressiva atferð.

Føroya Kærustovnur viðmerkir, at nýggj kunngerð um innflutning av hundum v.m. kom í gildi 1. oktober 2021, og samstundis fór kunngerð nr. 15 frá 7. apríl 2004 úr gildi, har tað var ásett, at tað ikki var loyvt at flyta inn ella hava kamphundar. Í áðurnevndu kunngerð merkti "kampundur" hundur, sum var aldur og vandur til aggressiva atferð, íroknað t.d. Pitt Bull Terrier, Tosa og blandingar av hesum sløgum.

Av tí at nýggj kunngerð er komin síðan avgerðin hjá Vinnukærunevndini varð tikin, kann hendan avgerðin ikki vera løgd til grund fyri at loyva innflutningi av hundinum hjá kæraranum. Umsóknin um innflutningloyvi av hundinum skal viðgerast eftir nýggju ásetingunum.

Hvat viðvíkur upplýsingunum frá kæraranum um, at fleiri hava innflutt Olde Engilsh Bulldogge til Føroyar, viðmerkir Føroya Kærustovnur, at tað framgongur av upplýsingunum í málinum at umsókn kærarans er tann fyrsta, sum er viðgjørd, síðan at kunngerðin varð broytt.

**Vísandi til omanfyri standandi hevur Føroya Kærustovnur avgjørt at staðfesta avgerðina hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, um at sýta innflutningi av hundinum hjá kæraranum, sum er av hundaslagnum Olde English Bulldogge.**

**Føroya Kærustovnur metir, at Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur gjørt eina ítøkiliga meting av hundaslagnum, og at tað ikki er grundarlag fyri at seta hesa metingina til síðis.**